# Lærarastørv og størv sum stuðul

## í Norðskála-Oyrar skúla

**Hesi størv verða lýst leys til setanar:**
- 3 lærarar í fast starv frá 1. august 2007
- 2 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 vegna lækkað tímatal, serligan tørv og avlopstímar
- 1 starv sum stuðul 30t/v

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Skúlanum tørvar fólk til:**
- Skúlabyrjan við serligum atliti at byrjunarlesing
- Innskúlin, so skiftið frá barnagarði til skúla er í góðum hondum
- Undirvísing í sangi og tónleiki
- Skúlabyrjan við serligum atliti at rokning
- Rokning við eldru flokkunum
- Toymisarbeiði
- Frálæru í ítrótti og svimjing
- Frálæru í leiki

**Førleikakrøv:**
Tey, ið verða sett í lærarastørvini, skulu hava læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. september 2007.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Starvið sum stuðul verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera 1.lærarানum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 20. juni kl. 10**

Setanarsamrøður verða í døgunum 21. og 22. juni.

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla Jákup Joensen, 1. lærara, á tlf. 442245 ella 771035. Eisini ber til at senda teldupost til 1. læraran: oli.jakup.joensen@skulin.fo

NORÐSKÁLA-OYRAR SKÚLI
Postboks 39 · FO-400 Oyrarbakki
Tlf. 442245 / 422275 og 771035

**Norðskála-Oyrar skúli** hevur komandi skúlaár umleið 70 næmingar í 5 flokkum. Við skúlan fara at starvast 8 lærarar, 1 stuðlul, og reingerðingarfólk.

Komandi skúlaár fer skúlin at arbeiða við at seta í verk fleiri menningarætlanir.

Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: skular.sunda.fo

---

**Tórshavnar Kommunuskúli**
Tórsgøta 25 · 100 Tórshavn · Tlf. 30 25 80
Fax. 30 25 81 · www.skulin.fo/KOM · kom@skulin.fo

# Varaskúlastjóri

Starvið sum 2. varaskúlastjóri í Tórshavnar Kommunuskúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2007.

**Søkt verður eftir 2. varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd skúlastjórans og í samstarvi við leiðslu, starvsfólk og samstarvspartar skúlans annars skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva, er virkisfúsur og fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, ábyrgdir og avbjóðingar, sum starvið og tíðin krevur
- leggur dent á stundvísi, nærlagni, fakliga og námsfrøðiliga menning.

**Harumframt skal 2. varaskúlastjóri** saman við 1. varaskúlastjóra vera næsti medarbeiðari skúlastjórans og
- átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi 20. juni 2007 kl. 12.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjórans, tlf. 30 25 80.

Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni, www.skulin.fo/kom

---

**Tórshavnar Kommunuskúli**
Tórsgøta 25 · 100 Tórshavn · Tlf. 30 25 80
Fax. 30 25 81 · www.skulin.fo/KOM · kom@skulin.fo

# Lærarastørv

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2007**
- 8 lærarar í føst størv
- 4 størv fyri lærarar í farloyvi
- 3 størv fyri lærarar í barnsburðarfarloyvi
- 2 lærarar í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2007/08 vegna lækkað tímatal, serligan tørv og avlopstímar.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- duga at samstarva, eru virkisfúsir og fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ábyrgdir og avbjóðingar, sum starvið og tíðin krevur
- leggja dent á stundvísi, nærlagni, fakliga og námsfrøðiliga menning

**Førleikakrøv**
Tey, ið sett verða, skulu hava læraraútbúgving. Læraralesandi, sum taka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

**Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu undirvísa í hesum lærugreinum:**
Føroyskum, støddfrøði, alisfrøði, evnafrøði, týskum, tøkni, ítrótti, donskum, lívfrøði, søgu og kristni.

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett støvr, uttan so er, at tey, sum sett verða, eru tænastumannasett frammanundan. Størvini eru lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. sep. 2007.

**Umsóknir**
Umsóknir við CV og avriti prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi 21. juni 2007 kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlastjórans, tlf. 30 25 80 ella 21 19 47.

**Kommunuskúlin** hevur komandi skúlaár 573 næmingar, 2 flokkar í hvørjum árgangi frá 1. til 7. flokki, 5 flokkar í 8. – 9. og 3 flokkar í 10. árgangi.Innskúlingin heldur til í nýggja Skúlanum í Kongagøtu, miðdeildin í Realskúlanum og 7. – 10. flokkarnir í høvuðsbygninginum. Í skúlanum starva 56 lærarar, 1 skrivstovufólk, 2 skúlavørðir og 15 reingerðingsfólk. Vit leggja dent á at menna KT í undirvísingini, at allir næmingar fáa sínar fakligu avbjóðingar í fjølbroyttari og mennandi frálæru í styrktum samstarvi millum heim og skúla. Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni.


Brúktbilatilboð



BMW 318i

Árgangur .......... 1996
Koyrt (km) .... 188.000
Sýnaður ....... okt. 2006
Prísur fyrr....... 82.700

NÚ kr. 56.000

nordcar
Smiðjugerði 4 · 100 Tórshavn · Tel 30 80 80
nordcar@nordcar.fo · www.nordcar.fo

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Arbeiðshandskar
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins største úrval
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo
Sosialurin 311820